*– Deyðarevsing stríðir ímóti vanligari lívsuppfatan og tænir ongum lógligum endamáli*

*(amerikonsk nevnd)*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK



# Aftur kjak um deyðarevsing í USA



*Avrættingin av Saddam Hussein hevur elvt til nýtt kjak um deyðarevsing.*

**Í statinum New Jersey umhugsa politikararnir at seta deyðarevsing úr gildi, og tað kann elva til nýtt kjak um málið**

Tingið í New Jersey hevur fingið eina frágreiðing frá einari nevnd, sum hevur kannað ymisk viðurskifti í sambandi við deyðarevsing. Sambært The New York Times er nevndin komin til ta niðurstøðu, at tað finnast eingi sannførandi prógv fyri, at deyðarevsing tænir nøkrum lógligum endamáli. Tvørturímóti heldur nevndin, at deyðarevsing stríðir ímóti vanligari lívsuppfatan, og tí mælir hon tinginum til at seta deyðarevsing úr gildi í New Jersey.

Tá amerikanski hægstirættur í 1972 setti øllum statunum forboð fyri at brúka deyðarevsing, valdu 38 statir at broyta lógina, so brotsmenn kortini kundu dømast til deyða og takast av døgum. Tað gjørdu politikararnir í New Jersey eisini. Tað var í 1982, men kortini er deyðarevsing ongantíð brúkt í statinum síðani 1963.

Tey seinastu árini hava politikararnir og dómsvaldið í New Jersey javnan umrøtt spurningin um at seta deyðarevsingina úr gildi, eftir at DNA-kanningar hava avdúkað, fleiri fólk eru vorðin dømd til deyða, hóast tey vóru ósek.

Í tinginum í New Jersey hava demokratarnir meiriluta. Teir eru ímóti deyðarevsing, og tað er tann demokratiski guvernørurin eisini. Tí bendir nógv á, at tingið fer at gera eftir tilmælinum um at seta deyðarevsingina úr gildi, skrivar The New York Times.

Tíggju aðrir amerikanskir statir, sum hava deyðarevsing, samdust fyri tíggju árum síðani um at steðga øllum avrættingum. Eygleiðarar halda, at avgerðin í New Jersey kann fáa stóran týdning fyri, hvat politikararnir í øðrum statum fara at gera.

**STUTT SAGT**

## Fáar vanlukkur

2006 var eitt gott ár hjá trygdini í altjóða flogferðslu og tað besta tey seinastu 43 árini. 156 flogfør duttu niður í fjør ella 22 færri enn árið fyri. Flogvanlukkurnar í fjør kostaðu 1.292 mannalív. Tað var 11 prosent færri enn í 2005 og svaraði til meðaltalið tey seinastu tíggju árini. Norðuramerika var tann heimsparturin, sum varð meinast raktur av flogvanlukkum í fjør, tí ein triðingur av øllum vanlukkunum vóru har. Tann ringasta vanlukkan var í Ukraina í august, tá 170 fólk lótu lív.

## Bann móti deyðarevsing

Italski forsætisráðharrin, Romano Prodi, sigur, at Italia fer at royna at fáa ST at samtykkja eitt altjóða forboð ímóti deyðarevsing. Nógvir italskir politikarar hava funnist hvassliga at avgerðini hjá iraksku myndugleikunum at heingja Saddam Hussein, og sjálvt fyrrverandi forsætisráðharrin Silvio Berlusconi hevur kallað avrættingina "eitt politiskt og søguligt mistak". 85 lond hava skrivað undir eina óbindandi samtykt ímóti deyðarevsing, men Romano Prodi sigur, at Italia fer at royna at fáa samtyktina at galda sum bindandi forboð.

## Ágangur

Bretska blaðið The Daily Telegraph vil vera við, at ST-hermenn hava misnýtt børn í Sudan kynsliga. Blaðið hevur roynt at fáa eina viðmerking frá ST, men uttan úrslit. Hetta er ikki fyrstu ferð, at ST-hermenn verða lagdir undir slíkt, og 179 hermenn og starvsfólk hjá ST eru fyrr revsað fyri at hava misnýtt børn kynsliga.

# Sigur seg vera ósekan

**Var tað Steven Wright, sum myrdi tær fimm skøkjurnar í enska býnum Ipswich? Tað ætlar løgreglan sær at prógva**

Í gjárgjørdi rætturin í Ipswich av at varðhaldsfongsla tann 48 ára gamla Steven Wright í fýra mánaðir, so løgreglan skal fáa stundir til at prógva, at tað var hann, sum myrdi fimm skøkjurnar, sum vórðu funnar deyðar í síðsta mánað.

Verjin hjá Steven Wright, Paul Osler, sigur við The Times, at Wright heldur uppá, at hann er ósekur. Annars vil blaðið Daily Telegraph vera við, at tann kendi sakførarin Karim Khalil skal verja Steven Wright, tá málið kemur fyri í rættinum tann 1. mai. Khalil hevur verið verji hjá fleiri kendum brotsmonnum, teirra millum Ian Huntley, sum myrdi tvær smágentur í Soham fyri nøkrum árum síðani.

Løgreglan vil í sínum lagi vera við, at Steven Wright myrdi tær fimm skøkjurnar í tíðarskeiðinum frá endanum á oktober til miðskeiðis í desember. Meiri enn 500 løgreglumenn hava arbeitt við málinum. Løgregluovastin í Ipswich, Alastair McWhirter, sigur við The Times, at upplýsingar frá almenninginum hava havt sera stóran týdning. Ikki færri enn 12.000 ferðir vendu fólk sær til løgregluna við ymsum upplýsingum, sum endaðu við, at Steven Wright bleiv tikin.



*Fimm skøkjur vórðu funnar myrdar í síðsta mánað*